


**MITT Í**

*Hotel Royal National liggur soleiðis fyri, at stuttur vegur er til nógv av tí, ið ger London til ein metropol*

# Royalt og mitt í býnum

Vilt tú vera nær lívliga miðbýnum í London, er Royal National Hotel eitt avgjørt boð uppá eitt hugnaligt og gott stað at gista í.

Royal National Hotel er størsta hotellið í miðbýnum, og kann rúma omanfyri 3500 gestum í teimum 1650 kømrunum.

Fyrimunurin við hesum hotellinum er, at tað liggur beint við eina tokstøð – Russel Square – um ein hevur brúk fyri tí.

Ynskir ein heldur at fara til gongu, so er heldur ikki langt at ganga oman í Oxford Street, Covent Garden, Trafalger Square, Soho, The British Museum og onnur støð.

Øll kømrini eru snøgg, útgjørd við sjónvarpi, útvarpi og einum te/kaffi-bakka.

Í hotellinum finnast eisini góðar matstovur, barrir, gávubúð og aðrar neyðugar tænastur.

Hevur ein hug at gera okkurt heilt annað, er ein heilsumiðstøð her og ein bowlinghøll í nánd. Hevur tú bilin við, ella hevur leigað tær ein, er ein parkeringskjallari eisini her.

Og tað er eitt uppihald á hesum hotellinum sum tú hevur møguleika at vinna í Rás2 mánamorgunin.



**3500 GESTIR**

*Hotel Royal National er størsta hotellið í miðbýnum í London. Her kunnu 3500 gestir sova samstundis*

